# Føroyingarnir fingu eitt stig í part

**Bæði í Vejle og Fremad Amager vóru teir hesa ferð nøgdir við avrikini, sjálvt um teir ikki fingu fulla úrtøku**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Jann Ingi Petersen hevur enn ikki roynt at vinna dyst við Fremad Amager, men avrikið um vikuskiftið var tó betri, enn tað hevur verið í flestu av hinum dystunum*

Higartil hevur Jann Ingi Petersen ikki upplivað at fara av vøllinum sum sigurharri í Fremad Amager troyggjuni. Hesa ferð var úrslitið á heimavølli 2–2 ímóti Silkeborg. Tað sóu 976 áskoðarar, og bæði teir og leiðlsan í felagnum vóru nøgdir við avrikið hjá heimaliðnum. Næstsíðst var tað vónbrot, at Fremad Amager tapti ímóti botnliðnum í Brønshøj.

Ímóti Silkeborg, sum er dygst undir uppflytingar strikuni, var hugburðurin góður. Jann Ingi Petersen var á vøllinum allar 90 minuttirnar. Tvífaldur málskjútti hjá Fremad Amager var Cihan Cengiz, veit heimasíðan hjá Fremad Amager at siga.

Úrsitið hjá Vejle var eisini 2–2, og avrikið var avgjørt góðkent. Vejle var í Ølstykke, har 573 áskoðarar sóu Christian Høgna Jacobsen vera á vøllinum alla tíðina. Christian Høgni var ikki ímillum málskjúttarnar, men hann var væl upplagdur, og hann var óheppin ikki at fáa mál. Í 16. minutti legði hann upp til útjavnandi málið við góðum innleggi til Tommy Schram, og fram ímóti steðginum var hann óheppin ikki at fáa mál, men lobbarin fóru dygst omanfyri samankomingina.

Tríggjar minuttir eftir steðgin stútaði álopsfelagin hjá Christian Høgna, Kenneth Knudsen, Vejle framum, og so lúrdi útisigurin. Christian Høgni var tætt við at økja um leiðsluna við góðari skotroynd. Eftir at Vejle hevði skift tríggjar ferðir út, varð ein av teirra spælarum skaddur. Tí vóru teir síðstu løtuna bara tíggju á vøllinum. Fýra minuttir undan leikloki javnaði heimaliðið til 2–2.

Felags fyri Vejle og Fremad Amager er, at tey framvegis hava niðurflytingar strikuna ikki so langt undir sær.

### Horsens nógv fremst

Tá ið Danmark í 1992 vann EM kappingina í Svøríki, var Lars Olsen liðformaður. Saman við honum í miðverjuni var Kent Nielsen. Nú er Lars Olsen venjari í Randers FC, og Kent Nielsen er venjari í Horsens. AC Horsens, sum hevur Johan Byrial Hansen á liðnum, er fremst í næstbestu deildini, og Randers FC er næstfremst. Sunnudagin hittust hesi bæði feløgini í Horsens, og tað var heimaliðið, sum endaði omaná. Úrslitið var 3–0, og nú skulu nógv umfør brúkast til at fáa fremsta plássið frá Horsens.

Hóast illa statt fíggjarliga so er Køge framvegis ovarlaga á støðutalvuni. Teir lyftu sær uppaftur nærri næstfremsta plássinum, tá ið teir á heimavølli vunnu 1–0 ímóti botnliðnum úr B1913. Hjá HFK Sønderjylland eydnaðist tað bara partvís at styrkja um sína støðu ímillum tey fremstu. Teir megnaðu bara málleysan javnleik á heimavøllinum í Haderslev ímóti FC Nordjylland, sum hevur staðið seg væl nógvu tær seinastu ferðirnar.

Botnliðið FC Aarhus tapti á heimavølli 2–1 ímóti Nykøbing Falster, og á Eysturbrúgv megnaði B93 bara 1–1 ímóti einum øðrum botnliði, Brønshøj. Eitt annað lið av Eysturbrúgv, Skjold, hevur orduliga fingið luft undir veingirnar. Hesa ferð vunnu teir 5–2 í Fredericia, har heimaliðið hevur ilt við at liva upp til góðu avrikini síðsta kappingarár.

**Danska superligan**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 16 | 12 | - | 2 | - | 2 | 27 | 9 | 18 | 38 |
| 2 Esbjerg | 16 | 11 | - | 3 | - | 2 | 30 | 14 | 16 | 36 |
| 3 FCK (M) | 16 | 9 | - | 4 | - | 3 | 23 | 12 | 11 | 31 |
| 4 OB | 16 | 8 | - | 4 | - | 4 | 34 | 23 | 11 | 28 |
| 5 AaB | 16 | 7 | - | 4 | - | 5 | 21 | 18 | 3 | 25 |
| 6 FCM | 16 | 7 | - | 2 | - | 7 | 28 | 23 | 5 | 23 |
| 7 Viborg | 16 | 5 | - | 4 | - | 7 | 30 | 27 | 3 | 19 |
| 8 AGF | 16 | 6 | - | 1 | - | 9 | 24 | 35 | -11 | 19 |
| 9 Herfølge | 16 | 4 | - | 5 | - | 7 | 17 | 21 | -4 | 17 |
| 10 FC Nordsj. | 16 | 3 | - | 5 | - | 8 | 18 | 30 | -12 | 14 |
| 11 Frem | 16 | 4 | - | 1 | - | 11 | 17 | 32 | -15 | 13 |
| 12 AB | 16 | 2 | - | 1 | - | 13 | 11 | 36 | -25 | 7 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

**Danska 1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 14 | 12 | - | 1 | - | 1 | 28 | 8 | 20 | 37 |
| 2 Randers FC | 14 | 9 | - | 2 | - | 3 | 37 | 22 | 15 | 29 |
| 3 Silkeborg | 14 | 8 | - | 4 | - | 2 | 30 | 12 | 18 | 28 |
| 4 Køge | 14 | 8 | - | 3 | - | 3 | 27 | 20 | 7 | 27 |
| 5 HFK Sønderj. | 14 | 7 | - | 3 | - | 4 | 38 | 21 | 17 | 24 |
| 6 Skjold | 14 | 7 | - | 2 | - | 5 | 33 | 26 | 7 | 23 |
| 7 FC Nordjylland | 14 | 7 | - | 2 | - | 5 | 17 | 17 | 0 | 23 |
| 8 Ølstykke | 14 | 7 | - | 1 | - | 6 | 33 | 27 | 6 | 22 |
| 9 Fredericia | 14 | 6 | - | 2 | - | 6 | 22 | 24 | -2 | 20 |
| 10 Nykøbing | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 23 | 24 | -1 | 18 |
| 11 B 93 | 14 | 4 | - | 3 | - | 7 | 24 | 27 | -3 | 15 |
| 12 Vejle | 14 | 4 | - | 3 | - | 7 | 23 | 30 | -7 | 15 |
| 13 Fremad Amager | 14 | 3 | - | 4 | - | 7 | 21 | 28 | -7 | 13 |
| 14 Brønshøj | 14 | 2 | - | 2 | - | 10 | 16 | 40 | -24 | 8 |
| 15 B 1913 | 14 | 1 | - | 4 | - | 9 | 12 | 33 | -21 | 7 |
| 16 FC Aarhus | 14 | 2 | - | 1 | - | 11 | 13 | 38 | -25 | 7 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Jann Ingi Petersen (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Næstved | 14 | 10 | - | 1 | - | 3 | 34 | 13 | 21 | 31 |
| 2 Dalum | 14 | 9 | - | 2 | - | 3 | 38 | 21 | 17 | 29 |
| 3 Holbæk | 14 | 7 | - | 4 | - | 3 | 25 | 21 | 4 | 25 |
| 4 HIK | 14 | 7 | - | 3 | - | 4 | 27 | 23 | 4 | 24 |
| 5 Jetsmark | 14 | 6 | - | 5 | - | 3 | 26 | 19 | 7 | 23 |
| 6 Slagelse | 14 | 6 | - | 3 | - | 5 | 26 | 20 | 6 | 21 |
| 7 B1909 | 14 | 6 | - | 2 | - | 6 | 30 | 25 | 5 | 20 |
| 8 Brabrand | 14 | 5 | - | 4 | - | 5 | 26 | 21 | 5 | 19 |
| 9 Kolding FC | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 23 | 23 | 0 | 18 |
| 10 Lyngby | 14 | 4 | - | 6 | - | 4 | 24 | 25 | -1 | 18 |
| 11 Holstebro | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 24 | 27 | -3 | 18 |
| 12 Kalundborg | 14 | 4 | - | 4 | - | 6 | 29 | 33 | -4 | 16 |
| 13 Glostrup | 14 | 4 | - | 2 | - | 8 | 20 | 31 | -11 | 14 |
| 14 Skive | 14 | 3 | - | 3 | - | 8 | 28 | 35 | -7 | 12 |
| 15 Hvidovre | 14 | 3 | - | 3 | - | 8 | 18 | 32 | -14 | 12 |
| 16 Hjørring | 14 | 3 | - | 2 | - | 9 | 16 | 45 | -29 | 11 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby), Atli Gregersen (Lyngby)

**Skotska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Celtic | 11 | 10 | - | 1 | - | 0 | 33 | 3 | 30 | 31 |
| 2 Rangers | 11 | 8 | - | 2 | - | 1 | 30 | 9 | 21 | 26 |
| 3 Hearts | 11 | 6 | - | 2 | - | 3 | 18 | 15 | 3 | 20 |
| 4 Dundee | 11 | 4 | - | 4 | - | 3 | 14 | 12 | 2 | 16 |
| 5 Motherwell | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 13 | 12 | 1 | 15 |
| 6 Dunfermline | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 10 | 10 | 0 | 15 |
| 7 Hibernian | 11 | 4 | - | 3 | - | 4 | 12 | 15 | -3 | 15 |
| 8 Livingston | 11 | 3 | - | 4 | - | 4 | 11 | 13 | -2 | 13 |
| 9 Kilmarnock | 11 | 3 | - | 2 | - | 6 | 12 | 25 | -13 | 11 |
| 10 Dundee Utd. | 11 | 2 | - | 3 | - | 6 | 7 | 19 | -12 | 9 |
| 11 Aberdeen | 11 | 2 | - | 1 | - | 8 | 9 | 23 | -14 | 7 |
| 12 Partick | 11 | 0 | - | 2 | - | 9 | 9 | 22 | -13 | |

2Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)



## Talvkapping

**Barna- og ungdómstalvkapping verður í Gøtu leygardagin 8. november.**
**8 umfør verða telvd, hvør parturin hevur 10 minuttir til talvið.**

**Skráin er henda:**

**Kl. 10:30 Vit hittast í Gøtu Skúla, møtið stundisliga!**
**Kl. 11:00 Kappingin byrjar**
**(væntandi verður liðugt umleið kl. 16)**

**Tilmelding skal verða komin fram í seinasta lagi hóskvøldið 6 november**

**Tilmelding til Gøtu Talvfelag v/Reinhold Isaksen, 510 Gøta. Ella á reinhold@post.olivant.fo**
**Meira fæst at vita á heimsíðuni www.faroechess.com**

**Setið navn, bústað og føðiár á umsóknina.**

**Tilmelding til talvkapping í Gøtu tann 8. november 2003**

**Navn:** ______

**Bústaður:** ______

**Føðiár:** ______

**Tlf. Nr.:** ______

**Talvsamband Føroya**

## Bilur til sølu



SUBARU LEGACY 2.0 i árg. 96/97 til sølu. Bilurin er sera væl hildin og hevur koyrt 104.000 km. Vetrardekk á felgum fylgja við. Ring

**Tlf. 260116**

## Elfelagið SEV
## søkir elektrikara

Til Innleggingardeildina hjá SEV verður søkt eftir fólki við sveinabrævi sum elektrikari ella við aðrari javnbjóðis útbúgving.

**Starvið:**
Arbeiðið umfatar tekniskt eftirlit, skráseting, kanning og útskifting av elmálarum v.m. í sethúsum og øðrum líknandi elinnleggingum kring landið.

Við tað, at arbeiðsøkið fevnir um alt landið, kann roknast við nógvari ferðing, sum í stóran mun fer fram við arbeiðsbili hjá SEV. Neyðugt er tí, at viðkomandi hevur koyrikort til vanligan persónbil.

Nakað av skrásetingararbeiði verður, og kann tí roknast við upp til ein dag um vikuna, har arbeitt verður við teldu.

**Lønin**
Lønin verður tímaløn sambært sáttmála millum Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Møguliga kann ein viðbót afturat tímalønini koma upp á tal seinni.

**Arbeiðsstaðið**
(uppmøtingarstaðið) er ikki ásett enn, men verður nærri avtalað við tann, ið settur verður. Staðið verður í Vestmanna ella í Tórshavn ella kanska í Skálafirði.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Eyðun S. Olsen, deildarleiðara ella John P. Danielsen, skrivstovustjóra á tlf. 346800.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast **Elfelagnum SEV, Box 319, 110 Tórshavn** og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann **18. november 2003**.

Tórshavn, tann 30. oktober 2003.

Elfelagið SEV

## Stuðulsgrunnur Føroya Blindafelags

Umsóknir um peningaligan stuðul úr Stuðulsgrunninum skulu vera grunninum í hendi í seinasta lagi 17. november 2003.

Umsóknarbløð fáast hjá Føroya Blindafelag.

Adr.: Føroya Blindastovnur
Íslandsvegur 10A, Thn.
Boks 2074
FO-165 Argir
Tlf. 31 82 22

**Endamál grunnsins er:**
At veita hjálp til blind og sjónveik, ið til fánýtis hava søkt um hjálp.

At veita stuðul til luttøku á skeiðum, fundum øðrum tiltøkum fyri sjónbrek-að í Føroyum og uttanlands – tó treytað av, at umsøkjarin er limur í Føroya Blindafelag.

**Nevndin**



Honda Civic aut. gear
við defektum motori
til sølu til hægstbjóðandi
yvir kr. 20.000,-

Árg. 06/1996 · Bilurin hevur nógva útgerð td. aircondition - fartpilot - elrútar framman og aftan - el-spegl - Sentrallás - Radio/bandspælara.

Sosialurin 341800

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi - 188 Hoyvík - Tel. 353040

**Hyundai Sonata 2.0 bensin**



prísur **183.500,-**

Myrkagráur · árgang 2002 · km. 32.000
El-rútar · aircondition v.m.
Sera vælhildin

**Toyota Hiace 2.4 diesel**



prísur **58.000,-**

Hvítur · árgang 1993 · km. 208.000
Summardekk og píkadekk í góðum standi fylgja við

Sosialurin 341800

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tlf 31 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

## Fólkaflokkurin í Eysturoynni

Fundur verður á Restaurant Muntra í Fuglafirði týskvøldið 4. november 2003 kl. 19.30.

Jacob Vestergaard, Jógvan á Lakjuni og Óli Breckmann vera við.

**Eysturoyar Fólkafloksfelag**

## Toyota Picnic '99 modell

Turbo Diesel, 7 setur, koyrt 86.000 km. Til sølu fyri 160.000,- kr.

Áhugað kunnu ringja á

**Fartlf. 21 65 59**